# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tú skuldi trúð, at vit høvdu lært lektiuna eftir tap á heimavølli móti B71 og GÍ. Men veruleikin er, at vit gera akkurát sama mistak* — *Jákup á Borg, HB*

# Skulu finna felags stev



**Saman við dómarum, venjarum og spælarum skipaði Kappingarnevndin hjá FSF í farnu viku fyri fundi við heitinum, Felags Stev**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Upprunaliga var ætlanin, at fundurin skuldi vera undan landskappingini, men hetta læt seg ikki gera av ymsum ávum.

Ístaðin stóð fundurin á skránni í farnu viku, og Karl Vidtfeldt, formaður í Kappingarnevndini, sigur, at talan var um ein sera góðan fund.

- Vit høvdu umboð fyri venjarar, spælarar og dómarar, og øll tóktist á einum máli um, at vit í Føroyum eru á rættari leið, hvat fótbóltsdømingviðvíkur. Sjálvandi eru altíð ávís viðurskifti, sum finnast kann at, men sum heild var talan um positivan og konstruktivan kritikk, sigur Karl.

Eitt var tó, sum hann fýltist á, og tað var uppmøtingin frá feløgunum. Bert 8 av 16 feløgum høvdu sent umboð til fundin, og hetta heldur Karl vera alt ov lítið.

### Felags linjan

Eitt, sum spælarar og venjarar havt fýlst á fyrstu umførini av landskappingini, er, at tað hava verið stór sveiggj frá dómara til dómara, hvussu hart hesir revsa spælarar í dystum. Og ikki minst, hvørji ting geva gul kort.

Dagfinn Olsen er formaður í Fótbóltsdómarafelagnum, og hóast hann ásannar hetta, so heldur hann samstundis, at tað er hampuliga avmarkað, hvat kann gerast í so máta.

- Vit dómarar eru jú menniskju, eins og øll onnur. Og tí letur tað seg illa gera, at allir døma fullkomuliga eins. Hinvegin royna vit støðugt at eftirmeta avrikini, og millum málini her er sjálvandi, at dømingin skal verða so jøvn, sum tilber.

- Men serliga við byrjan av kappingarárum sært tú frávik. Tað er sum so eisini ein trupulleiki, sum er galdandi fyri spælarar. Tekur tú hagtølini fyri í ár, so verða nógv kort givin fyrstu dystirnar, men tá spælarar og dómarar hava funnið seg betri til rættis, fellur tað talið av sær sjálvum.

### Fáir dómarar

Ein annar trupulleiki, sum er ítøkiligur, er, at talið av dómarum til fremstu deildirnar er í lægra lagi.

Í ár eru soleiðis átta dómarar góðkendir. Men av hesum er Ransin N. Djurhuus í løtuni uttanlands, og Páll Augustinussen hevur av persónligum ávum valt at taka frí frá dømingini í mai mánaði. Tað gevur seks dómarar, sum kunnu døma dystir í fremstu deildini, og tá kann tað svíða hart, um sjúka ella onnur avboð brádliga stinga seg upp.

*Tað er hugvekjandi at síggja, at maðurin, sum tvey ár á rað er kosin besti dómarin, eisini er tann dómarin, sum gevur fæstu kortini*

Á yvirlitinum her á síðuni sæst, hvussu dómararnir hava býtt kortini ímillum sín fyrstu átta umførini hetta kappingarárið. Stigatalið sýnir, hvussu nógv Fair-Play revsistig hvør dómari hevur givið í meðal.

| | 1. umf. | | 2. umf. | | 3. umf. | | 4. umf. | | 5. umf. | | 6. umf. | | 7. umf. | | 8. umf. | | Íalt | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dómari** | g | r | g | r | g | r | g | r | g | r | g | r | g | r | g | r | g | r | Dystir | Stig p |
| Rúni Gaardbo | 8 | | | | 5 | 2 | 6 | 1 | | | 6 | 1 | 6 | | 2 | | 33 | 4 | 6 | |
| Páll Augustinussen | 3 | 1 | | | | | 7 | | | | | | | | | | 10 | 1 | 2 | |
| Eiler Rasmussen | | | 6 | | 4 | 1 | | | 3 | | | | 2 | | 5 | | 20 | 1 | 5 | |
| Dagfinn Olsen | 1 | 1 | 4 | 1 | | | 4 | 2 | 2 | | 3 | | 1 | | | | 15 | 4 | 6 | |
| Ransin | 2 | | | | 3 | 1 | | | | | | | | | | | 5 | 1 | 2 | |
| Jens Petur | | | 3 | | | | 3 | | 7 | | 1 | | | | 4 | | 18 | 0 | 5 | |
| Lars Müller | | | 3 | | 5 | | | | 3 | | 5 | | 2 | | 3 | | 21 | 0 | 6 | |
| Petur Reinert | 3 | | 2 | | 2 | | 5 | | 6 | | 1 | | 5 | | 1 | | 25 | 0 | 8 | |

Gult kort telur 1 stig og reytt kort 3 stig. Í yvirlitinum er reytt kort við gult+gult roknað sum 1 reytt kort.

## Fótbóltsskúlar aftur í ár

Fótbóltssambandið skipar aftur í ár fyri fótbóltsskúlum kring landið. Skúlarnir eru fyri børn í aldrinum 8-14 ár, og verða teir í Havn, Sandavági, Vági tann 29. og 30. juni, og á Toftum 6. og 7. juli.

Á fótbóltsskúlunum verður dentur lagdur á at hava tað stuttligt, samstundis sum lært verður, og at fótbóltsskúlin gerst ein upplivíng fyri lívið við nýggjum vinarbondum.

Venjingin er fyrst og fremst løgd til rættis sum spæl, og á fótbóltsskúlanum kunnu øll vera við.

Luttakararnir fáa eina T-shirt, sodavatn, góðgæti, ein fótbólt og luttøkuprógv.

Tilmeldingin fer fram umvegis teldupost til virgar@football.fo við viðkomandi upplýsingum. Eisini ber til at ringja á 351972 og melda til. Freistin er 1. juni og meiri fæst at vita á heimasíðuni www.football.fo

